Sandoyggin illa fyri

Í løtuni arbeiða fólk á Sandoynni við at fáa avtalu við Pf. Fiskavirking um leigu ella keyp av flakavirkinum heima á Sandi, soleiðis at fiskur av Føroyagrunninum kann arbeiðast har. Hetta er ímóti treytum Pf. Fiskavirkings, men kanska loyvi verður givið fyri ávísar fiskanøgdir.

BEATE L. JENSEN

Fyrst í vikuni vóru umboð fyri Sands bygdarráð í Havnini og kunnaðu landsstýrið um støðuna í Sandoynni, har um hálvt annað hundrað fólk eru uttan arbeiði.

Stórur áhugi er í oynni at sleppa at leiga flakavirkið hjá Pf. Fiskavirking heima á Sandi ella kanska keypa tað, tí sum er, sleppa sandoyingar ikki at arbeiða fiskin har inni, bert at goyma hann har.

Sandoyingar arbeiða í løtuni við eini ætlan at sleppa at arbeiða tosk og hýsu av Føroyagrunninum, tí teir hava longu ein áhugaðan keypara til fiskin, um tað skuldi verið.

Sum er, er tað kostnaðarmikið hjá sandoyingum, tá teir skulu hava fiskin frá útróðrarbátunum fluttan inn á Toftir. Flutningsútreiðslurnar í sambandi við hetta liggja um hálva aðru krónu fyri kilo.

Harðar treytir

Treytin hjá Pf. Fiskavirking at leiga sandoyingum flakavirkið er, at eingin fiskur av Føroyagrunninum verður arbeiddur har.

Men so mikið hevur Pf. Fiskavirking tó latið seg yvirtalað, at tað kanska kann geva loyvi til, at ávís nøgd av fiski av Føroyagrunninum kann arbeiðast á flakavirkinum.

Hetta mál er tó verri enn so avgreitt enn.

Sum er, er støðan í Sandoynni ótolandi, og tí vilja sandoyingar hava flakavirkið heima á Sandi latið upp. Helst vildu teir eisini havt flakarvirkið í Skopun til at latið upp eisini.

Í løtuni verður arbeitt við einum áliti frá einum politiskum arbeiðsbólki í Tinganesi. Tó er hetta sera ógreitt enn, tí ein partur av hesum sama málið liggur í løgtinginum í samband við fígging.

Flakið lakasproytað

Eitt krav er, at tann fiskur, sum útróðrarbátarnir fiska, skal arbeiðast uppi á landi, og tá fer tann stóri toskurin til Toftir, tí hann skal viðgerast á ein serligan hátt sambært krøvum keyparans.

Keyparin vil hava saltaðan tosk, har toskaflakið skal vera so tjúkt sum møguligt.

Flakið verður síðani lakasproytað á ein serligan hátt:

Tunnar sproytur, ið eru at meta við nálir, verða í eini maskinu settar niður í flakið. Sproyturnar spræna saltlaka út í flakið, sum eftir hetta verður lagt í stakkar í einum serligum saltlaka – og aftaná pakkað.

Hetta er tann saltfiskur, ið gevur besta prís á útlendska marknaðinum, sigur Ivan Johannesen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum.

– Keyparar vilja hava saltaða flakið so tjúkt sum gjørligt.

HM-hondbóltur í Íslandi 1995

Leikt er fram til fjórðingsfinalurnar í HM-kappingini. Dystirnir í 1/8 finalunum vóru flestu spennandi, meðan Russland avsmurdi vertstjóðina Ísland 25-12. Í dystinum Kroatia-Tunesia noyddist umdystur og brotskøst til, áðrenn vinnarin varð funnin. Og Kekkia-Suðurkorea leiktu eisini umdyst, áðrenn vinnarin varð funnin.

Fjórðingsfinalurnar vórðu leiktar í gjár, aftaná at blaðið fór til prentingar.

● Í Bangladesh hevur ein malaria-umfarsótt kostað meiri enn 150 fólkum lívið. Talan er um eitt serligt slag av malaria, ið setir seg á heilan. Fleiri doyggja innan eitt samdøgur eftir at verða smittað. Síðani mars í ár eru 350 fólk deyð av hesi malaria. Nærum 20.000 fólk eru í løtuni smittað.

● Amerikanski verjumálaráðharrin undir Vietnamkrígnum, Robert McNamara, er boðin á almenna vitjan til Vietnam. Samstundis hevur amerikanska stjórnin boðið Vo Nguyen Giap, genarali, ið var leiðandi krígsfyriskiparin í Vietnam um hetta mundi, til Amerika á almenna vitjan.

● Tibetanski leiðarin í útlegd, Dalai Lama, hevur víst á ein 6 ára gamlan drongur sum eftirmann Panchen Lama, ið var næsthægsti trúarleiðarin í tibetansku buddhismuni. Panchen Lama doyði bert 50 ára gamal í 1989, og sambært Dalai Lama er smádrongurin ein reinkarnatión av Panchen.

● Í Paris er heimskendi terroristurin Carlos fluttur úr La Sante fongslinum til eitt annað, sum eitur Fresnes, og sum liggur eitt sindur uttanfyri Paris. Carlos er fluttur vegna strangari trygdartiltøk. Tá Carlos av og á verður avhoyrdur av dómarum, hevur hann leinkjur um beinini.

Sjálvuppgávufundir

Fólkafloksungdómur og valfeløgini hjá Fólkaflokkinum skipa fyri almennum fundum við heitinum »Sjálvuppgávan á postkorti« í sambandi við uppskot floksins um einfaldari og lagaligari skattaskipan. Tingmenninir Jørgin Niclasen og Óli Breckmann greiða frá.

Fundir vóru mikukvøldið 17. mai á Hotel Hafnia í Havn, hóskvøldið 18. í Tekniska skúla í Klaksvík, fríggjakvøldið 19. í Eydnuni á Oyrarbakka, øll kvøldini kl. 20.30, og sunnukvøldið 21. í Bygdarhúsinum í Miðvági kl. 20.00.

Bygningurin, har gamla landsbókasavnið og forngripasavnið húsaðust, er sera vakur. Oljufyrisitingin fer nú undir takið saman við Jarðfrøðisavninum og DGU

Oljubygningurin liðugt umbygdur fyrsta dagin

Arbeitt verður av øllum alvi at fáa gamla landsbókasavnið liðugt, so Oljufyrisitingin, Jarðfrøðisavnið og DGU kunnu fáa innivist.

Tað verður arbeitt av øllum alvi, so gamla landsbókasavnið kann verða liðugt í næstum. Oljufyrisitingin skal húsast undir hesum taki. Tilsamans 5 fólk arbeiða á Oljufyrisitingini, har Martin Heinesen er stjóri. Umframt skulu eisini Jarðfrøðisavnið og DGU undir sama tak. 4 fólk arbeiða á Jarðfrøðisavninum, meðan eitt fólk arbeiðir hjá DGU.

Arbeiðið at flyta er byrjað, men tað tekur nakað av tí, verður upplýst á oljufyrisitingini. Men møblar eru farnir oman, so tey rokna ikki við, at tað tekur drúgva tíð aftrat.

– Einaferð síðst í næstu viku er alt komið uppá pláss undir takinum á gamla landsbókasavninum, varð sagt á Oljufyrisitingini í gjár.

Bygningurin á Debesartrøð hevur fyrr verið Landsbókasavn og Forngripasavn. Í farna ári varð avrátt, at Oljufyrisitingin skuldi húsast í hesum bygningi. Og í næstu viku gerst hetta veruleiki. So er bert eftir at vóna, at oljan eisini einaferð kemur úr havbotninum.



Talan er bert um smáting aftrat, áðrenn bygningurin er liðugt umvældur og klárur til oljufyrisitingina

REYKJAVÍK, DIMMALÆTTING (Sverrir Þórðarson)

Havisur, kópur og hvalur

Á ískanningunum við flogfari mánadagin yvir havøkinum út fyri Norðurlandið fleyg flogfarið frá sjóverjuni yvir ísflakum, sum rukku yvir eitt stórt øki um 40 fjórðingar úr Horninum norðast á Vestfirðum.

Her sóu flogmenninir túsundtals kópar, sum lógu og sólaðu sær á ísflakunum. Flogmenninir siga í Morgunblaðnum týsdagin, at gjøgnum 20 ára ískanningarflúgving yvir hesum isøkjum hava teir ongantíð fyrr sæð so nógvan kóp. Teir vóru savnaðir á einum umleið 15 fjórðingar longum og um hálvan fjórðing breiðum áli. Frammanundan hevur hent seg, at flogmenninir hava sæð einar 20-40 kópar.

Flogmenninir greiddu eisini frá, at fyri nøkrum vikum síðani flugu teir yvir eitt øki, har fleiri túsund hvalir svumu í vatnskorpuni á einum um 100 fjórðinga longum strekki! Hetta var yvir opnum havi út fyri eystfirðum.

Russiskt høgrasamstarv

Davíð Oddsson forsætisráðharri var millum gestirnar, sum vitjaðu Moskva til hátíðarhaldið í sambandi við sigurin á Triðja Ríkinum í 1945. Beint áðrenn hann fór heimaftur, fekk Davíð Oddsson bræv frá russiska politikaranum og fyrrverandi forsætisráðharranum Jegor Gajdar, sum er formaður í flokkinum »Frítt demokratiskt val«.

Í brævinum til forsætisráðharran, sum er formaður í Sjálfstæðisflokkinum, ynskir Gajdar at koma í samband við flokkin og formannin. Hann sigur í brævinum, at flokkur hansara er høgrumegin miðjuna og søkir samskifti við politiskar flokkar í Vestureuropa. Flokkurin er við at koma í fastalegu innan russisku floksskipanina.

Davíð Oddsson hevur sagt, at hann fegin vil koma í samband við Gajdar og flokk hansara, og at tað er týdningarmikið. Politisku flokkarnir í Russlandi eru við at tilevnast, og demokratiskur framvøkstur í flokkunum er sera neyðugur. ▲

Ferðamannafelagið ráðstevnu í juni

Vikuskiftið 17.-18. juni skipar Føroya Ferðamannafelag fyri stórari ráðstevnu í Nesvík. Ráðstevnan er ætlað limum felagsins. Teir fáa høvi at kunnu seg um mangt og hvat viðvíkjandi ferðavinnuni í Føroyum.

JÁKUP MAGNUSSEN

Føroya Ferðamannafelag, sum varð endurstovnað herfyri, er farið undir at virka. Ferðamannafelagið er felag fyri gistingarhús, matstovur, bussfeløg, handlar og onnur, ið hava tætt samband við ferðavinnuna.

Á ráðstevnuni í Nesvík í næsta mánaða, fara royndar kreftir innan føroyska ferðavinnu at halda fyrilestrar fyri luttakarunum. Teir verða í høvuðsheitum limir felagsins. Væntandi verður onkur fyrilestrarhaldari úr útlondum eisini við á ráðstevnuni hjá Føroya Ferðamannafelag í Nesvík.

Føroya Ferðamannafelag leggur hart út eftir endurstovnanina. Ein av orsøkunum er, at Vest Norden Travel Mart verður hildið í Føroyum í september í ár. Henda ferðavinnustevna gevur limunum stórar avbjóðingar.

Ráðstevnan verður skipað sum lega. Luttakararnir verða saman nátt sum dag. Men hví ikki skipa fyri vanligum fyrilestrum í staðin.

Sámal Bláhamar, formaður í Ferðamannafelagnum, sigur, at stórur munur er á at halda fyrilestrar, og at skipa fyri ráðstevnu/legu, har millum annað fyrilestrar verða hildnir. Legan er meira sum ein Work shop.

Bláhamar sigur, at Ráðstevnan í Nesvík fer at hava nógvar funksjónir. Og aðalmálið er at samansjóða aktivu partarnar í føroysku ferðavinnuni.

Til dømis fara skipaeftirlitið, ferðaráðið, landsstýrið, prentsmiðir, Travel Mart, bankar, telefonstøðin, tryggingin og onnur at greiða frá sínum virksemi og hvørjar tænastur tey kunnu geva. Luttkakararnir verða upplýstir um júst tað, tey hava brúk fyri í sínari støðu í ferðanetinum.

Á henda hátt vónar Føroya Ferðamannafelag, at sambandið millum limir felagsins verður enn tættari og virknari, sigur formaðurin.

Ferðavinnan í Føroyum hevur ment seg nógv tey seinastu árini, men enn er langt á mál. Verður rætt atborið, kann og eigur ferðavinnan at gerast eitt mundandi størri ískoyti til trongda føroyska búskapin, sigur Ferðamannafelagið.

Samskiparin fyri Vest Norden Travel Mart, Elsa Johanna, verður við á ráðstevnuni í Nesvík. Hon fera at greiða frá stóru og umfatandi ferðavinnustevnuni í september.

Rossini eru seinastu árini vorðin partur av føroysku ferðavinnuni Mynd: Diml./Jens Kr. Vang